# Talvferd til Slovakia

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum í eitt orð hevur skrivað um talv í Sosialinum, hevur verið á talvferð saman við Eyðuni Nolsøe. Niðanfyri verður prentað ferðafrásøgn teirra*

CENS & EN



Úr Keypmannahavn gekk leið okkara suður gjøgnum Evropa. Endastøðin í Presov, Slovakia skuldi vísa seg at verða 27 drúgvar toktímar framanfyri okkum. Áhugavert var at eygleiða landslagið sum streymaði ímóti okkum suður gjøgnum Týskland, Kekkia og Slovakia. Ein sera vøkur náttúra við nógvum skógarvøkstri, fjøllum og breiðum áum. Tað teknologiska landslagið broyttist eisini, jú longur eystureftir vit komu. Niðurslitin ídnaðartól, bygningar og tokstøðir, og skorsteinarnir sum spýttu svartan royk úr sær. Fyri hvørt tokskiftið vit gjørdu versnaði støðið.

Í Presov sum liggur heilt eystri í Slovakia, væntaði okkum ein sera hugnaligur og gestablíður býur. Summarið er serstakliga heitt har á leiðini, og hjá hesum stolta fólki sýntist høgt til lofta og vítt til veggja.

Í teatrinum í miðbýnum, sum er ein av hesum glæsiligu betonmonstrunum frá kommunistatíðini, varð talvkappingin hildin. Umleið 300 telvarar luttóku, við undirritaðu sum einastu umboð úr vesturheiminum. Umframt høvuðskappingina vórðu eisini aðrir talvaktivitetir fyriskipaðir, eitt nú simultan í blindtalvi. Her eydnadist Carl Eli at vinna ímoti kjekkiska IM´arinum Haussner, sum telvaði blint ímóti 5 telvarum. Hesin Haussner vann 3-2.

**Misjøvn úrslit**

Kappingin hjá undirritaðu gekk heldur misjavnt. Heilt fram til sjeynda umfar hevdi Eyðun eina sera góða kapping við fleiri góðum úrslitum móti sterkari mótstøðu. Í næstsíðsta -og síðsta umfarinum gekk orkan undan, og hóast lovandi støður á talvborðinum tapti Eyðun tey síðstu talvini. Eyðun fekk hálvtfimta stig av níggju møguligum.

Carl Eli hevdi ilt við at koma í gongd móti sterku mótstøðuni, og raknaði ikki vid fyrrenn ímóti endanum, tá hann megnadi 1,5 stig av tveimum teimum seinastu talvunum. Carl Eli endaði loksins við trimum stigum.

Samanumtikið ein frálík ferð og eitt gott talvupplivilsi. Vit vilja **takka Føroya Lívstrygging, Postverk Føroya og Nordoya Sparikassa** fyri vælvildina hesi sýntu við at studla okkara talvferð.

**Talvið hesa ferð**

Talvid í blaðnum er ein góður skalpur hjá Eyduni úr 5. umfari.

Hvítt. Eydun Nolsøe
Svart. Frantisek Lisko: 2339

Presov Chess Festival 12-20. august 2000

1.e4 c5 2. Rif3 Ric6 3. d4 cxd4 4. Rixd4 Rif6 5.Ric3 e5 6.Rib5 d6 7.Bg5 a6 8.Ria3 b5 9.Rid5 Be7 10.Bxf6 Bxf6 11.c3 Bg5 12.Ric2 0-0 13.Rice3 Rb8 14.b3 g6 15.g3 b4 16.c4 Rid4 17.Bg2 Bh6 18.0-0 Bg7 19.Ric2 a5 20.Rixd4 exd4 21.Fd3 a4 22.Rif4 f5 23.Rie2 Ff6 24.Rad1fxe4 25.Fxf4 Bf5 26.Fd5+ Kh8 27. Rixd4 a3 28.Rixf5 gxf5 29.Fxd6 Fg5 30.f4 Fg4 31.Bf3 Fh3 32.Rfe1 Bc3 33.Re6 Bg7 34.c5 Rg8 35.c6 Bf8 36.Fe5+ Bg7 37.Fe2 Rc8 38.Rd7 Bf8 39.Fe5+ Bg7 40.Rxg7 Rxg7 41.Re8+ Rxe8 42.Fxe8+ Rg8 43.Fe5+ Rg7 44.c7 svartur gavst 1-0

# GÍ úr niðurflytingarvandanum

*2. deild: GÍ kom til Runavíkar fyri at spæla uppá skjótálop, og taktikkurin við góðum verjuspæli eydnaðist eisini til fulnar*

STEFAN Í SKORINI

Gøtumenn vunnu ein kærkomnan 2-0 sigur á grannunum úr Runavík, og við hesum sigrinum hava teir tikið eitt stórt fet burturfrá niðurflytingarvandanum, sum teir annars hava verið í.

GÍ royndi fyrst og fremst at halda málið reint, og síðani síggja um tað bar til at skapa nakað frameftir vøllinum. Hetta vísti seg at verða eitt klókt útspæl, tí alt gekk sum fótur í hosu hjá gøtumonnum. Hóast NSÍ hevði bóltin meira, var tað GÍ, sum skeyt málini í dystinum, og tað var eisini teirra ætlan.

Fyrra málið kom, eftir at 25 minuttir vórðu farnir. Eftir eitt GÍ álop í NSÍ brotsteiginum, støkk bólturin útfrá til Bárð Heinason, sum við einum langskoti úr 25-metra fjarstøðu sendi bóltin í netið og legði harvið útiliðið framum 1-0. Hetta var eisini støðan eftir fyrra umfar.

Einar fimm minuttir inn í seinna hálvleik fekk GÍ sítt seinna mál. Tað var Jan Skoradal, sum setti eitt brotsspark í málið. Magni Jakobsen rak fleiri NSÍarar av, og komin inn í brotsteigin, varð hann feldur, tá ein verjuspælari var ov seinur at seta takklingina inn. 2-0 til GÍ var eisini endaliga úrslitið, sum GÍ kempaði seg fram til.

Eftir hetta royndi NSÍ av øllum alvi at leggja trýst á GÍ málið, men tað eydnaðist bara ta einu ferðina at skapa ein opnan møguleika. Málverjin hjá gøtumonnum bjargaði tó, tá ein NSÍari kom at standa púra fríur frammanfyri málinum.

NSÍ misti við hesum tapinum ein góðan møguleika at nærka seg ÍF, sum er á triðja plássi, og harvið er møguleikin fyri einum heiðursmerki nú eisini minni. Hetta var eisini annað tapið á rað hjá NSÍ. Næsta vikuskiftið skal NSÍ royna seg móti B36 í Havn, og um NSÍ vinnur tann dystin, so er enn møguleiki fyri at ogna sær eitt bronsumerki. Tað verður tó torført, tí tað vísir seg ikki at verða lætt at vinna á B36 í Gundadali, har havnarliðið enn ikki hevur tapt nakran dyst.

GÍ hevur vitjan av Royn næsta vikuskiftið, og um trý stig verða fingin til høldar tá, so er lítil vandi fyri niðurflyting.

**NSÍ-GÍ 0-2 (0-1)**
0-1: Bárður Heinason
0-2: Jan Skoradal

# KÍ útnyttaði síðsta korterið

*2. deild: KÍ vann botndystin ímóti Royn 3-0, hóast einki mál var komið eitt korter fyri leiklok*

STEFAN Í SKORINI

KÍ legði nógv fyri í royndini at vinna botndystin ímóti Royn í Klaksvík leygardagin, og tað var eisini viljin til at vinna, sum at enda var á muni millum liðini.

Tá eitt korter restaði av dystinum var einki mál komið, men síðani setti klaksvíkingar hol á við brotssparki, sum Fríðin Ziskason setti í málið. Brotssparkið var dømt, eftir at innskifti Karl Marius Poulsen var trýstur í ryggin, tá ein høgur bóltur varð sendur inn í brotsteigin.

Tá fimm minuttir vóru eftir at spæla økti Johannes Færø til 2-0. Hann vann sjálvur bóltin frá einum Royn-spælara í høgru síðu, dróg inn í brotsteigin og sendi bóltin flatt í handara síðunet.

Og beint áðrenn leiklok fekk KÍ aftur brotsspark, tá Karl Marius Poulsen varð feldur stutt frá baklinjuni. Karl Marius sendi sjálvur brotssparkið í málið til endaliga úrslitið 3-0.

**Byrjaðu væl**

Royn var fyrstu minuttirnar nær við at leggja seg fram um. Hvalbingar byrjaðu dystin sera væl, og tvær ferðir eftir hornaspark mátti KÍ-málverjin, Meinhardt Joensen, forða fyri, at Royn skoraði.

Fyrst var tað vágbingurin John Eystberg, sum stútaði, men Meinhardt fekk sligið bóltin á tvørstongina og út, og seinnu ferðina var tað aftasti maður, Poul Poulsen, sum royndi seg, men aftur bjargaði Meinhardt.

John Eystberg mátti av vøllinumv ið skaða eftir einar 20 minuttir, og í hálvleikinum máttu bæði John Ryan og Tomislav Sivic hjá KÍ gevast at spæla, tí teir høvdu fingið snuddir.

KÍ hevði leikliga yvirvág mesta av tíðini, og serliga í seinna hálvleiki trýsti heimaliðið. Royn royndi fyrst og fremst at verja, men tá teir komu aftur um 1-0, fóru teir fram á vøllin. Teir høvdu gyltan møguleika at javna eftir frísparksinnlegg frá Zoran Mancic, men avslutningurin var ov vánaligur.

Og tá KÍ skoraði til 2-0, misti Royn mótið, og KÍ kundi hvat økt fleiri ferðir seinastu løtuna.

**KÍ-Royn 3-0 (0-0)**
1-0: Fríðin Ziskason
2-0: Johannes Færø
3-0: Karl Marius Poulsen

# Leiftur er á veg út av tromini

*Allan Simonsen sá Jens Martin Knudsen spæla væl í vánaliga botndystinum í Reykjavík*

Dagarnir í bestu deildini hjá føroyska liðnum fram um onnur í íslendskum fótbólti tykjast vera av á hesum sinni. Tað eru tvey umfør eftir at spæla, og eftir ósigurin móti Stjarnuni í Reykjavík sunnudagin skal tað leitast langt út fyri at finna lítla møguleikan fyri, at Leiftur eisini komandi ár skal spæla í bestu deildini.

Men hóast 2–1 tapið vilja føroyingarnir ikki samtykkja í, at møguleikin er fokin.

– Møguleikin er lítil, men hann er har. Vit fara at stríðast av øllum alvi fyri at fáa seks stig. Um tað skuldi eydnast, so er tað á ongan hátt víst, at tað verður nóg mikið, men vit hava ikki givið skarvin yvir.

Hetta sigur Sámal Joensen, sum saman við John Petersen hugdi, meðan liðfelagarnir stríddust fyri lívinum. Teir vóru báðir leikbannaðir.

– Hesin dysturin var ikki góður frá okkara síðu. Teir komu á odda, tá eitt korter var farið. Talan var um eitt fínt langskot. Vit javnaðu við góðum stútara, tá 20 minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki. So kastaðu vit alt fram fyri at fáa sigursmálið. Vit høvdu onkran møguleika, men teir fingu einasta málið, tá tað restaðu átta minuttir. Tað fingu teir eftir snarálop, greiðir Sámal Joensen frá.

Málskjútti hjá Leiftri var Ingi H. Heimisson. Tveir minuttir undan leikloki fekk hann reyða kortið. Hann hevði tá fingið tvey gul kort fyri ófantaligar taklingar.

Sámal Joensen iðrar seg ikki so nógv um tapið sunnukvøldið, sum hann iðrar seg um úrslitini fyri stuttum móti KR og ÍBV:

– Sunnudagin spældu vit illa. Í hinum báðum dystunum spældu vit væl, men vit fingu bara eitt stig burturúr. Tá vit taptu 1–0 móti ÍBV høvdu vit einar fimm risa stórar málmøguleikar, og tá vit spældu 0–0 móti KR, høvdu vit einar tríggjar stórar møguleikar. Tað var sera spell, og tað kann seinni fara at vísa seg at vera lagnukent, at vit ikki skoraðu í teimum dystunum.

10. september fær Leiftur vitjan av Fram, og 16. september skulu teir í síðsta umfarinum spæla á útivølli í Keflavík. Tá skal Páll Guðlaugsson vitja aftur í felagnum, sum hann fyrr í summar var venjari hjá.

**Allan í Íslandi**

Landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, hevði fyri langari tíð síðani gjørt av, at hann í hesum vikuskiftinum skuldi vera í Íslandi fyri at fylgja landsliðsmonnunum. Bara ein av trimum landsliðsmonnum var á vøllinum sunnudagin. Sámal Joensen heldur, at Jens Martin Knudsen spældi ein fínan dyst.

Í gjárkvøldið skuldi Allan Simonsen hyggja at dystinum millum Fram og ÍA. Uni Arge og teir skuldu vitja á Laugardalsvøllinum klokkan átta í gjárkvøldið, sum er tað sama sum klokkan níggju føroyska tíð.

ÍA hevur ivaleyst mist møguleikan at vinna meistaraskapin. Teir spæla fyri plássi í Europa Cup, men tað verður torført hjá teimum. Í síðstu umførunum skulu teir spæla í Keflavík og á útivølli móti Fylkiri.

JH



# Óli aftur í hitanum

Danmark: Bæði Todi og Jákup vunnu, og harvið lættu Herfølge og FCK sær úr botninum

Sunnudagurin var ein góður dagur hjá føroysku spælarunum í superliguni. Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson vunnu, og Óli Johannesen kom aftur á besta liðið hjá AGF.

Vit kunnu siga, at Óli Johannesen kundi bæði smílast og gráta, tí AGF tapti 3–1 í Herfølge.

Tolin trívst plagar at verða tikið til. Óli Johannesen hevur, síðani Ove Christiansen kom til AGF, ikki kent seg í nánd av besta liðnum, men undan næstsíðsta vikuskiftinum fekk hann eina ábending um, at kanska fór tað ikki at vera so leingi, inntil møguleikin fór at koma:

– Umframt ein málverji er loyvt at hava tríggjar eykamenn á beinkinum. Venjarin hjá okkum hevur altíð ein eykamann við, um okkurt skuldi borist á undir upphitingini. Tá vit spældu heima móti AB, var eg 16. maðurin, sum teir kalla tað. Tí kom tað ikki so óvart á, at eg fekk boð um at koma við til Herfølge.

**Endaði í álopinum**

Óli Johannesen sat á beinkium fyrra umfarið. Tað gekk illa hjá AGF. Jesper Jacobsen legði Herfølge framum í 9. minutti, og í steðginum var AGF venjarin so misnøgdur, at hann skifti tveir spælarar út. Lennars Bak, sum hevði verið ytstur í vinstru í fl-tu verjuni, varð fluttur fram á miðvøllin, og Óli Johannesen kom inn á bakkplássið.

– Har havi eg ongantíð spælt í AGF. Men nú tú sigur tað, so haldi eg meg minnast, at tá vit vunnu FM í B36, tá brúkti Tomislav Sivic meg onkuntíð í síðuni. Teir komu framum 2–0 í 70. minutti, og tá Nocko Jokovic tveir minuttir seinni hevði minkað um munin, fekk eg boð um at fara fram í álopið.

Hevði tú nakran møguleika at fáa mál hjá Jákupi Mikkelsen?

– Nei, men eg átti at fingið ein góðan møguleika. Eg rak móti brotsteiginum og kundi havt roynt við skoti. Í staðin valdi eg at spæla eitt tvey við Nocko Jokovic. Men hann var ikki við upp á tað og royndi sjálvur móti málinum. Aftaná segði hann, at hann hevði ikki fangað mína ætlan. Eg hevði verið púra leysur, og so er spurningurin, hvussu tað hevði gingist ein móti einum móti Jákupi, sigur aftasti maður á landsliðnum.

Óli heldur ikki, at hann spældi seg á liðið í Herfølge:

– Avrikið var vánaligt hjá øllum liðnum. Eg vóni, at eg fái møguleikan næstu ferð.

AGF venjarin Ove Christiansen ynskti eftir landsdystin móti Danmark Óla Johannesen tillukku við einum góðum landsdysti. Óli heldur ikki, at tað var landsdysturin, sum bar pláss á AGF liðnum við sær:

– Tað hevur gingið væl undir venjing, og tað hevur gingið væl í dystunum á næstbesta liðnum, men sjálvandi er tað nógv hugaligari at spæla í superliguni, sigur Óli Johannesen.

**Jákup arbeiðsleysur**

Fyri Herfølge, sum hevði John Faxe Jensen á miðvøllinum, var tað sera týdningarmikið at vinna.

– Jákup var tryggur. Hann hevði lítið at gera, tí tað var sjáldan, at vit komu í nánd av málinum hjá hon um. Tá Nocko Jokovic skoraði okkara mál, stóðst støðan av misskiljing í verjuni hjá teimum. Jákup hálvbjargaði í fyrstu atløgu, men bólturin fór út aftur til Nocko, sum skoraði, sigur Óli Johannesen.

**Todi í hopla**

34.333 áskoðarar møttu í Parkini í Keypmannahavn. Tað ber boð um, at fótbóltshugaðir høvuðsstaðarbúgvar halda grannauppgerðina millum FCK og Brøndby vera nakað serligt. Men tað ber eisini boð um, at áhugin fyri er øktur, nú teir innanfyri eina viku hava keypt ikki færri enn fýra spælarar.

Jacob Laursen er nýggjur liðformaður hjá FCK. Hann hevði stóran myndugleika í miðverjuni. Ståle Solbakken var síðsta hálva tíman á miðvøllinum, og tað var beinanvegin eyðsýnt, at hann hevur evini, sum skulu til fyri at fáa javnvág millum verju og álop og millum síðurnar.

Todi Jónsson var alla tíðina ytstur í vinstru, og hann var væl upplagdur. Søren Colding hevði stórar trupulleikar av føroyinginum, sum ferð eftir ferð sneiddi fyrrverandi landsliðsmannin av og fór til baklinjuna.

Todi hevði onkra roynd móti málinum, men serliga í 2. hálvleiki var hann noyddur at taka nógv lut í verjupartinum. Tá var FCK undirmannað, tí Thomas Rytter var rikin av vøllinum eftir at hann hevði brúkt neyðbremsuna.

Thomas Thorninger, sum hesa ferð var í álopinum saman við norðmanninum Harald Brattbakk, stútaði til 1–0 í 1. hálvleiki. Zuma skoraði eitt framúr mál, tá hann stutt eftir at FCK hevði fingið reyða kortið, fóru sjálvur, dróg 40 metrar og skoraði. Spenningur kom í, tá dómarin eftir hornasparksstøðu helt, at FCK hevði gjørt brotsspark. Søren Colding skoraði, men FCK megnaði at halda tætt.

JH

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viborg | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 9 | 4 | 5 | 11 |
| 2 | Silkeborg | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 9 | 12 | -3 | 11 |
| 3 | AaB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 8 | 2 | 10 |
| 4 | FC M | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 8 | 2 | 10 |
| 5 | AB | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 11 | 5 | 6 | 9 |
| 6 | Lyngby | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 7 | 9 | -2 | 9 |
| 7 | AGF | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 8 | 11 | -3 | 9 |
| 8 | Brøndby | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 16 | 7 | 9 | 8 |
| 9 | OB | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 5 | 3 | 7 |
| 10 | FCK | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 6 | 2 | 7 |
| 11 | Herfølge | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 9 | 18 | -9 | 6 |
| 12 | Haderslev | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 5 | 16 | -11 | 1 |

# Sogndal segði takk fyri síðst

*Noreg: Tepri sigurin á Byåsen ger, at føroyingarnir framvegis hava møguleika at flyta upp*

Tað var sera strevið, men tað eydnaðist. Sogndal hevði trý stig til hús aftur við sær, tá teir sunnukvøldið høvdu verið og vitjað Byåsen. Tað er altíð kærkomið at vinna á útivølli, men hesa ferð var sigurin serliga søtur. Sogndal vann 26. juli 6–1 á Byåsen á útivølli, men ta ferðina vóru stigini tikin frá teimum, og Byåsen vann øll stigini við málmuninum 0–0. 84 áskoðarar vóru til dystin, og 50 teirra høvdu ferðast úr Sogndal fyri at hyggja at.

Hesa ferð var tað nógv strævnari hjá Sogndal at vinna. Julian Johnsson og Hans Fróði Hansen vóru báðir leikbannaðir, meðan Kurt Mørkøre var í álopinum alla tíðina. Hann fekk eitt gult kort. Talan var um fjórða gula kortið í hesum kappingarárinum.

Sogndal fekk sigursmálið, tá tað restaðu tíggju minuttir. Málskjútti var Dag Christian Sørum, sum er liðformaður hjá Sogndal. Hann hevur áður spælt í Byåsen. Uppleggið til málið stóð Tommy Øren, álopsfelagin hjá Kurt Mørkøre, fyri. Hann sendi innfyri úr vinstru.

Sogndal spældi væl í 1. hálvleik. Tá høvdu teir fýra stórar møguleikar, men teir fingu ikki mál.

Í 2. hálvleiki vóru teir meiri kroystir. Byåsen hevði onkrar heilt góðar royndir, men Sogndal málverjin, Terje Skjeldestad, vardi væl fyri. Aftaná varð hann kosin besti maður á vøllinum.

Kurt Mørkøre var við í nógvum. Hann spældi fleiri ferðir liðfelagarnar leysar til royndir móti málinum, og onkra ferðina var hann sjálvur framvið. T. d. hevði hann onkran stútara, sum fór tætt framvið, og so hevði hann eitt gott langskot úr 20 metrum, sum streyk framvið málinum.

Men tað týdningarmesta var, at Sogndal megnaði at vinna, sjálvt um Hans Fróði Hansen og Julian Johnsson ikki vóru við. Nú fara føroyingarnir at hugsa um landsliðsfótbólt. Sogndal hevur frí frá landskappingini til 10. september. Tá fara teir undir endaspurtin. Fyribils sær tað út til, at tað fer at enda við endadystum um eitt pláss í bestu deildini. Men møguleikin fyri næstfremsta plássinum og harvið beinleiðis uppflyting er avgjørt ikki burtur.

JH

**Støðan, íslendska landssímadeildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fylkir | 16 | 9 | - | 5 | - | 2 | 36 | 13 | 23 | 32 |
| 2 | KR | 16 | 9 | - | 4 | - | 3 | 22 | 13 | 9 | 31 |
| 3 | ÍBV | 15 | 7 | - | 5 | - | 3 | 24 | 13 | 11 | 26 |
| 4 | Grindavík | 16 | 6 | - | 6 | - | 4 | 21 | 16 | 5 | 24 |
| 5 | ÍA | 15 | 6 | - | 4 | - | 5 | 14 | 12 | 2 | 22 |
| 6 | Keflavík | 16 | 4 | - | 6 | - | 6 | 17 | 28 | -11 | 18 |
| 7 | Breiðablik | 15 | 5 | - | 1 | - | 9 | 24 | 27 | -3 | 16 |
| 8 | Fram | 15 | 4 | - | 4 | - | 7 | 19 | 26 | -7 | 16 |
| 9 | Stjarnan | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 14 | 24 | -10 | 16 |
| 10 | Leiftur | 16 | 1 | - | 7 | - | 8 | 17 | 36 | -19 | 10 |

**Støðan, norska 1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lyn | 20 | 17 | - | 2 | - | 1 | 45 | 13 | 32 | 53 |
| 2 | Strømsg. | 20 | 13 | - | 4 | - | 3 | 45 | 21 | 24 | 43 |
| 3 | Sogndal | 20 | 11 | - | 5 | - | 4 | 54 | 30 | 24 | 38 |
| 4 | Raufoss | 20 | 8 | - | 6 | - | 6 | 38 | 29 | 9 | 30 |
| 5 | Kongsv. | 20 | 8 | - | 6 | - | 6 | 32 | 28 | 4 | 30 |
| 6 | Ham-Kam | 20 | 8 | - | 3 | - | 9 | 34 | 35 | -1 | 27 |
| 7 | Tromsd. | 20 | 8 | - | 1 | - | 11 | 30 | 47 | -17 | 25 |
| 8 | Sandefjord | 20 | 7 | - | 3 | - | 10 | 30 | 33 | -3 | 24 |
| 9 | Skeid | 20 | 6 | - | 5 | - | 9 | 23 | 34 | -11 | 23 |
| 10 | L/F Hønef. | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 30 | 34 | -4 | 22 |
| 11 | Kjelsås | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 24 | 34 | -10 | 22 |
| 12 | Byåsen | 20 | 7 | - | 0 | - | 13 | 22 | 38 | -16 | 21 |
| 13 | Strindheim | 20 | 5 | - | 4 | - | 11 | 26 | 40 | -14 | 19 |
| 14 | Eik-Tønsb. | 20 | 5 | - | 3 | - | 12 | 22 | 39 | -17 | 18 |